# Rasmus Rasmussen.

* 13. august 1871. † 5. oktober 1962.



Fáfongd kennist royndin at rista minnisrún um mann, sum longu á lívi var vorðin hugtak.

Hugtak um teir, sum við berum hondum fóru undir at bróta upp úr nýggjum. Sum ongantíð vóru móðir ella hálvir. Sum altíð trúðu og aldri gjørdust svíkar. Sum ongantíð tóku sær av løttum, men sum altíð stóðu í andglettinum og aldri eirdu sjálvan seg.

Tílíkur maður var Rasmus á Háskúlanum framum teir flestu í nýggjari søgu okkara. Honum untist eitt langt lív, men í tí bar hann eisini fleiri mansbyrðar heim í garð enn menn flestir. Hann mundi vera tann seinasti, ið enn var eftir, og sum skaraði framúr tí manngarði, har teir øxl móti øxlum við andans vápnum bardust fyri, at tjóð okkara, mál og mentan skuldu ikki glatast, men at komandi ættarlið skuldu súgva sær megi úr og fáa gott í beinini av tí, sum undanfarnu ættirnar høvdu lagt eftir seg, so at tey skuldu støðast *her á landi* og føða seg við tí, sum skil, dugnaskapur, nærlagni og røkjuskapur fór at veita teimum.

Um hann kann sigast, at hann til fulnar hevði livað eftir teimum orðum, hann á ellisárum setti føroyingum sum stavnhald: »Samkenslan, ábyrgdarkenslan og hin sanna medvitandi, virksama tjóðskaparkenslan, sum sýnir seg meira í offurvilja enn í føgrum orðum.«

Ivaleyst var hann tann fyrsti, sum burtur av skilti, at ikki fóru vit heldur enn aðrar tjóðir at koma upp undan og at vinna fram uttan hollan kunnleika til náttúruna. Hann mundi vera tann fyrsti, sum (í Búreisingini 1902) royndi at málbera seg á føroyskum í alis- og evnafrøði; men burtur av keys hann sær tann livandi gróðurin.

1909 kom fyrsta plantufrøðiliga grein hansara, longu í 1910 Plantulæran — eitt bragd, so ómýkt føroyskt mál tá var á hesum øki — og síðani komu øll árini, til hann sat blindur, so av og á úrslitini frá kanningum hansara av tí, hann hevði verið varugur við. Men ikki fyrr enn í 1936 aðalverkið: *Føroya Flora.* Tá var Rasmus á 65. ári. Sjálvur skrivar hann í formælinum, hvussu hann hevur barst við tilfarið og við málið, áðrenn hann vildi lata hesa fyrstu roynd í at skriva eina floru á føroyskum úr hondum.

Henda bók hoyrir uppí tey ómissandi virðini í bókmentum okkara. Hon flutti marknagarðin og legði inn nýtt lendi. Tí ikki er hon bert eitt væl skrivað og skipað álit hjá honum, ið fæst við føroyskan gróður, heldur ikki er hon ein trilvandi roynd, men hon er fyrsta fullfíggjaða prógvið um, at burtur úr illa viðfarnu málleivdum okkara ber til at skapa eitt vísindarligt mál — at tað veldst bert um arbeiðshug, áræði og treiskni.

Tí fyri Rasmusi var málið eitt rættuligt amboð. Ikki eitt gamalt lasafar at kína og syngja uppi yvir og at seta upp á pall uppsnákað, tá ið onkur vildi sleppa at síggja. Tað ráddi hjá honum minni um at tæna teirri »løtu mannatunguni« (ikki ókent tiltak nú á døgum til vernd fyri jánkasliga málnýtslu) ella at skriva tað í bókaummælum gitna »lætta og livandi rótføroyska málið«, enn tað ráddi um at gerast førur fyri at fáa sagt beint tað, ið hann vildi, við orðum, sum noyddust — so tekur hann til í floruni — at »hava serstakliga neyva merking.«

Lat hesa bók í støðum vera knortluta, og málnýtsluna summar staðir í fyrstuni koma lesaranum óvart við. Hvørt heitið og hvør setningur eru vend og snarað, gjølla umhugsað og merkt av at vera farin gjøgnum ein bjartan mannaheila.

Um alt tað, sum ósagt var í hesi bók, tað meiri dularfulla, sum altíð er bundið at tí, sum grør, segði hann okkum frá í Gróðranýtsluni (1946) og í hinari aðalritgerðini: Føroysk plantunøvn (1950).

Hann bar fleiri mansbyrðar heim í garð enn hesar, tó ikki skulu teir nógvu stíggirnir, hann gekk undir teimum, verða nevndir her. Men hann, sum ongantíð hevði høvi til at kenna Rasmus sum háskúlamann, fær — hugsi eg — ongan sterkari varhuga av hesum virki hansara

enn av at lesa tveir teir seinastu stubbarnar, hann skrivaði í Varðan (1951, bls. 205 og 1952, bls. 60). Teir eru sum mergjandi lestrar at ganga á, táið ivi og hugsjúka vitja. Høvdu vit ongantíð gloymt seinastu orð hansara úr *Enn er bót á borði*: »Enn liggur hon á borði, men hon verður ikki liggjandi alla ævi, um vit ikki nýta hana; hon fánar burtur við órøkt og vanvirðing.«

Stórar sjónir høvdu teir sæð, og miklar setningar høvdu teir sett sær, hesir menninir, sum Rasmus hevði fylgst við frá ungum árum; men ikki bliknaðu sjónirnar, taið teir eldust. Heldur rættu teir ein lívandi lógva móti hvørjari nælandi nál.

Táið yngri menn – heldur enn ikki varnir, væntandi sær okkurt hádingsorði – á fundi h. 17. desembur 1952 skutu upp at stovna Føroya Fróðskaparfelag, sat Rasmus beint yvir av honum, ið hetta skrivar. Eygnabrá hansara stuðlaði, táið uppskotið nakað trilvandi varð borið fram. Og hann var hin fyrsti, ið bað um orðið, og sum beinan vegin gjørdi alt so sjálvsagt.

Í sama stól settist hann h. 27. apríl 1958, táið samtykt varð at gera Málstovnin. Aftur kendist tað á eygnabragdinum, at stavnhaldið mundi ikki vera so skeivt, sum onkur tóktist at halda.

Og so leingi hann var mentur at ragga, vitjaði hann javnan niðan í »Neystið«. Tey fyrrru árini altíð til at hava okkurt á lofti, sum runnið var fram fyri hann, og sum vert var at handfara gjøllari. Tey seinru árini at vita, hvat ið menn høvdust at. Sjónin var farin at bila. Hann sá hvørki at lesa ella skriva. Hann gekk gjøgnum stovurnar, tók okkurt upp í hondina, hevði tað upp móti eygunum og legði tað aftur. Ikki segði hann stórt, fagurlátin var hann ongantíð.

Men táið hann var út aftur farin, kendi tú teg styrktan. Sum hevði tú fingið lógvatak frá einum teirra, ið kongarnar settu – »tí manni, sum fór undir at lata náttúruvísindini málbera seg á okkara tungu og festi landsins gróður á blað.«

*H. D. Joensen.*